

# VÁGA FLOGHAVN

## Sløkkiliðsfólk

Søkt verður eftir tveimum sløkkiliðsfólkum til fast starv at byrja sum skjótast og í seinasta lagið 1. mai 2008.

**Uppgávur:**
Uppgávurnar fevna m.a. um:
- Brand- og bjargingartænasta
- Sjóbjargingartænasta
- Trygdareftirlit (Security)
- Annað fyrikomandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
- Koyrikort til lastbilar, ella hevur tikið koyrikort innan 3 mánaðar eftir, at tú er sett/settur í starv
- Hevur góðar samstarvsførleikar og er fyrikomandi
- Kunnelika til enskt og teldu á brúkarastøði
- Hevur førleika at málbera teg í skrivt og talu, herundir at skriva frágreiðingar
- Sýnsváttan til trygdareftirlitsfólk
- Heilsuváttan til sløkkiliðsmenn
- Revsiváttan frá politinum

Lønin er sambært lønarflokki 14 í sáttmála við HK-Trafik og Jernbane

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og fjølbroytt starv við mongum ymiskum uppgávum.
Setanin verður sum "tænastumanna-líknandi setan".

**Vit ynskja, at bæði kvinnur og menn søkja størvini.**

Skrivlig umsókn verður at senda til Vága Floghavn, FO-380 Sørvágur.

Umsókn við møguligum prógvum o.ø. skulu verða okkum í hendi áðrenn hósdagin **27. mars klokkan 12.00**

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Ortind á telefon 354400 og Finnboga Niclasen á telefon 354400/354402

Vága Floghavn er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur til endamál at reka Vága Floghavn. Í løtuni verður arbeitt við at leggja virksemið hjá Vága Floghavn í eitt partafelag.

# Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Pedagogur til Útibarna-garðin Látipípuna

Í samband við, at Útibarnagarðurin skal vaksa um virksemi, hava vit nú tørv á einum starvsfólki afturat.

Søkt verður eftir:
- Einum pedagogi 40 tímar um vikuna. Møguleiki er fyri at tosa um niðursetta tíð.
- Um eingin pedagogur søkir, verður eitt hjálparfólk sett

at byrja skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 1. juni 2008.

Látipípan er ein stovnur við útibarnagarði, sum er eitt tilboð til 5-7 ára gomul børn, umframt frítíðarstovu til børn í 1. og 2. flokki.

Vit kunnu bjóða:
- Ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjørðu.
- Ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- Ein stovn í menning, har øll hava møguleik fyri at seta síni fingramerki
- Eitt arbeiðsumhvørvi, har dentur verður lagdur á greitt samskifti á øllum økjum
- Ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

Vit vænta av tær, at:
- Tær dámar at verða nógv úti saman við børnunum
- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Tú hevur góð samstarvsevnir
- Tú ert opin og erlig/ur í samskiftinum við onnur

Nærri fæst at vita við at ringja til Einu Andreasen, leiðara, á tlf 230145.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivlig umsókn skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi **8. apríl 2008, kl. 1600.**

Látipípan
og
Vestmanna Kommuna

# MB NORÐHAVIÐ

søkir mann at reka línufiskiskap

Áhugaði kunnu ringja á tlf. 283138

## Námsfrøðingur, Barnagarðurin á Svangaskarði, Toftir

**Søkt verður eftir:**
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 35-40 tímar um vikuna, at byrja **01.05.08** ella so skjótt sum tilber.

Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í starvið tíðaravmarkað.

Barnagarðurin er ætlaður 55 børnum, hevur tvær stovur, Sóldøgg og Sólareyga, har børnini hava sítt tilknýti.
Ein verkstað, Sólarglottin, har børnini gera ymiskt ítriv. Hvønn dag eru 7 børn úr hvørji stovu á verkstaðnum.
Vit arbeiða við "Trin for trin".
Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svangaskarði, tætt við náttúruna og við nógvum møguleikum at vera úti.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11-17, hjálparfólk í skala 1-5.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Ingrid Hansen, leiðara á tlf 448760/565021

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi **31.03.2008 kl. 12.00.**

**Nes Kommuna**
650 Toftir
www.nes.fo
nes@nes.fo

**Stuðulsbúðin fyri Danmissiónina**
**Gamalt - Nýtt fer at gevast,**
**hjálp okkum at tøma handilin**

**GAMALT - NÝTT**

# MASKINMAÐUR

Søkt verður eftir royndum maskinmanni at bryja skjótast til ber. Talan er um virkini í Skopun og heima á Sandi

Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Olsen, virkisleiðara á tel. 211 316

Umsóknir skulu sendast til:

**SANDOY SEAFOOD**
**240 Skopun**